# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Vit siga einum stórum hugsjónarmanni farvæl

Í morgun komu deyðsboðini av Svend Auken, fyrrverandi formanni í danska Javnaðarflokkinum. Svend var ein stórur maður í orðsins rætta týdningi. Men eisini eitt stórt og rúmandi menniskja, hugsjónarmaður av teimum størstu og ein politikari, sum ikki varð tikin í leikum.

Hann kundi altíð grundgeva fyri sínum meiningum, og tí var trupult hjá mótstøðufólkum at siga honum ímóti. Tí gjørdist hann ein av teimum fáu at uppliva eitt heilt lív í politikki Hann kom á fólkating sum ein av yngstu tinglimunum tá og var royndasti tinglimur í Fólkatinginum, nú hann andaðist 66 ára gamal. Men hann var har ikki fyri sína egnu skuld, men fyri fólksins sakir. Hjá Svend Auken snúi politikkur seg um menniskjavirðing, menniskjavirði og menniskjatilfeingi. Fyri hann snúi tað seg um at byggja upp eitt vælferðarsamfelag, har tann einstaki kennir seg væl í felagsskapinum, kennir seg taka lut og gera mun í flelagsskapinum - kennir seg til nyttu og virdan í felagsskapinum. Auken var fólksins maður um ein háls.

Vit eru nógv, sum sóu eina stóra fyrimynd í Auken, og hann var eisini høgt virdur um allan heimin. Hann gjørdist ongantíð forsætisráðharri, men sum umhvørvismálaráðharri setti hann veruliga umhvørvispolitikkin á dagsskrá í Danmark og gjørdi Danmark kent og virt úti í heimi sum undangonguland á umhvørvis- og orkuøkinum. Hetta livir Danmark uppá enn. Og uttan iva er tað orsøkin til, at Keypmannahavn er valt at vera vertur fyri heimsumfatandi veðurlagsráðstevnuni, sum skal vera í heyst.



*Svend Auken heldur fyrilestur í Norðurlandahúsinum í Havn*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tað eydnaðist Svend Auken at gjøgnumføra javnaðarhugsjónina um vælferðarsamfelagið í 70 árunum og 80 árunum. Men alla tíðina var hann upptikin av at endurnýggja projektið, sum eftir hansara fatan ongantíð bleiv liðugt.

Tá hoyrdi tú á honum, tá tú prátaði við hann, og eina best sást tú hetta í rørandi og fangandi samrøðu í Information herfyri, sum var gjørd fáa tímar undan, at hann datt um í summarhúsi sínum og ongantíð ordiliga kom fyri seg aftur.

Umframt at vera ein stórur og høgt mettur politikari, var Svend Auken eisini ein ógvuliga vinsælur maður. Vit hittust av og á í sambandi við politiska arbeiði, og altíð var hann fyrikomandi og prátingarsamur. Hann fylgdi ógvuliga væl við í viðurskiftunum í Føroyum og hevði eina stóra vitan um føroyskan politikk - bæði dagsins aktuellu viðurskifti - og heilt aftur til tíðina hjá Petur Mohr Dam.

Hóast ikki óvæntað, so kendist tað løgið at fáa deyðsboðini í morgun, dagin eftir, at eg hevði brúkt og endurgivið Auken sum fyrimynd í røðu mínari í sambandi við viðgerðina av løgmansrøðuna. Tí er helst hóskiligt at enda við somu enda hesa stuttu minningargrein við somu endurgeving:

»Javnaðarhugsjónin er ikki at øll skulu forsyrgjast, men at tey skulu klára seg.«

Friður verið við minninum um stórpolitikaran og menniskjað Svend Auken.

**John Johannessen, løgtingsmaður**

# Vitin á vinstra armi slóknaður

**Svend Auken var ikki bara stórur á vøkstri, men við deyða hansara hevur Christiansborg mist ein av teimum størstu, donsku politikarunum í nýggjari tíð**

**POLITIKKUR**
*Árni Joensen:*
*arni@sosialurin.fo*

Svend Auken fekk 38 ár í Fólkatinginum og var harafturat ráðharri í fleiri førum. Hann náddi eisini at gerast formaður hjá Sosialdemokratunum, men fall eftir eina søguliga uppgerð við Poul Nyrup Rasmussen. Aftan á uppgerðina hevði Svend Auken sín egna stuðulsbólk ella -vong í flokkinum, og nógvir danskir sosialdemokratar mettu hann sum hann besta forsætisráðharran, sum Danmark ongantíð fekk.

Fyri fimm árum síðani fekk Svend Auken staðfest, at hann hevði krabbamein. Tað eydnaðist at basa sjúkuni, men fyri tveimum árum síðani kyknaði hon aftur, og síðani hevur tað verið týðiligt, hvønn veg tað bar. Svend Auken duldi ikki sína sjúku, ella at hann var illa sjúkur, og hann helt á við sínum politiska virki. So seint sum 1. mai helt hann røðu í Århus, har hann eggjaði sosialdemokratunum til at blása nýggjan anda í nasarnar á fakfelagsrørsluni.

Svend Auken var 28 ára gamal, tá hann bleiv valdur í Fólkatingið í 1971. Fýra ár seinni varð hann valdur til næstformann í sosialdemokratiska flokkinum, og hann gjørdist formaður, tá Anker Jørgensen legði frá sær í 1987. Um tað mundið hevði sosialdemokratiski flokkurin 55 umboð í Fólkatinginum, men við Svend Auken sum oddvita fekk flokkurin 69 umboð á valinum í 1990, og sjálvur fekk Auken fleiri persónligar atkvøður enn nakað annað valevni.

Valið var samstundis tað besta hjá Sosialdemokratunum nakrantíð. Men úrslitið var kortini ikki nóg mikið til at útvega flokkinum stjórnarvaldið, og tað gjørdi, at kreftir í flokkinum settu spurnartekin við leiðaraevnini hjá formanninum.

### Atkvøðuslúkur

Sum nevnt tapti Svend Auken dystin við Poul Nyrup Rasmussen um formanssessin í sosialdemokratiska flokkinum ella "kvettið", sum dysturin ofta verður nevndur. Men Auken var ikki tann, sum setti seg í eitt horn at bína, men valdi tvørturímóti at virka fyri flokk og land á sama hátt, sum hann hevði gjørt.

Í nítiárunum sótu Sosialdemokratarnir við róðrið í Danmark, og hesi árini bleiv Svend Auken kendur sum ein sterkur umhvørvis- og orkumálaráðharri, og hann eigur ein stóran lut í, at Danmark er millum tey fremstu londini innan eitt nú vindorku. Sjálvur helt hann tó, at hann hevði sín besta dag í politikki, tá hann sum ráðhari í arbeiðsmarknaðarmálum fekk Fólkatingið at samtykkja eftirlønina.



*Svend Auken saman við Rigmor Dam, blaðkvinnu á Sosialinum, seinast hann vitjaði í Føroyum í oktober í fjør. Myndin er tikin á redaktiónini í Miðlahúsinum*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

Øll árini var hann framvegis tann stóri atkvøðuslúkurin hjá flokkinum, og hann dugdi væl at vera í miðdeplinum. Hansara lætta sinnalag og hansara hvassa tunga góvu lurtarum og hyggjarum manga hugtakandi løtuna sum eitt nú teir siðbundnu valdystirnar við Uffe Ellemann-Jensen á lærda háskúlanum í Århus.

Eftir Svend Auken sita fýra børn og konan, Anne Wievel.

*(Kelda: DR)*